# ÁRSINS VITANARFRÓÐU



KAPPING 2017

## HVØR BRÚKAR MEIRA ELEKTRISTET Í 7. FLOKKI Í EYSTURSKÚLANUM, GENTUR ELLA DREINGIR?



Granskarar: 7. flokkur í Eysturskúlanum

# INNGANGUR

Vit í 7. flokki í Eysturskúlanum hava valt at granska innan evnið “elektrisitet”.

Vit hava arbeitt miðvíst í ein góðan mánaða, har vit hava nýtt undirvísingartímarnar í støddfrøði og alis- og evnafrøði til arbeiðið.

Vit byrjaðu við einum hugaroki um evni “elektrisitet”, og her komu vit fram á fleiri undranarverd øki. Undranarspurningarnar settu vit síðan í nakrar høvðusbólkar:

- Hvør brúkar meira elektristet í 7. flokki í Eysturskúlanum, gentur ella dreingir?
  - Í hesum bólki eru fleiri undirbólkar.
- Hvussu fáa vit elektristet í Eysturskúlan?
- Hvussu er el-nýtslan broytt í Eysturskúlanum tey seinastu 30 árini?
- Hvussu ávirkar ljós akvariumfiskar?

Vit hava valt at granska einsæris og í bólkum við trimum ella fýra næmingum. Hetta gjørdu vit, tí vit mettu, at vit á hendan hátt komu tættari at undranini hjá tí einstaka. Tilsamans hava vit 11 granskingarbólkar. Av hesum hava vit eisini valt at hava fleiri frágreiðingar, sum vit lata inn. Hvønn dag hava vit havt felagsprát um, hvussu tað gongur hjá okkum granskarum. Á hendan hátt hava vit fingið innlit í granskingina hjá hvørjum øðrum, fingið íblásur av hvørjum øðrum og fingið vegleiðing frá lærarunum.

**Lærarar:**


Jacob Eli Olsen: jacob.eli.olsen@skulin.fo

Niklas Fríðrikur Joensen: niklas.fridrikur.joensen@skulin.fo

Johann Petersen: johann.petersen@skulin.fo

Annika Heinesen: annika.heinesen@skulin.fo


**Luttakarar:**

Boas, Dánial, Julian, Ejvind, Pætur, Bjørn, Dánial Kyrri, Niklas, Hadi Johan, Petur, Dávid, Benjamin, Samuel, Janus, Nataniel, Djóni, Femja, Jóhanna, Olga, Yngva, Hervør, Lilja, Barbara, Hildur, Maibrit, Rebekka, Maika Magreta, Durita, Elin, Ró, Silja, Marita.


Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD


| | |
|---|---|
| 1. Hetta undrast vit á? | s.3 |
| 2. Hví er tað so? | s.3 |
| 3. Legg eina ætlan | s.4 |
| 4. Savna upplýsingar | s.4 |
| Her verða einstaku hypotesurnar viðgjørdar: | |
| 3.1 Hypotesa 1 - Legg eina ætlan - | s.5 |
| 4.1 Savna upplýsingar | s.5 |
| 3.2 Hypotesa 2 - Legg eina ætlan - | s.7 |
| 4.2 Savna upplýsingar | s.8 |
| 3.3 Hypotesa 3 - Legg eina ætlan - | s.10 |
| 4.3 Savna upplýsingar | s.10 |
| 3.4 Hypotesa 4 - Legg eina ætlan - | s.12 |
| 4.4 Savna upplýsingar | s.12 |
| 3.5 Hypotesa 5 - Legg eina ætlan - | s.14 |
| 4.5 Savna upplýsingar | s.14 |
| 3.6 Hypotesa 6 - Legg eina ætlan - | s.16 |
| 4.6 Savna upplýsingar | s.16 |
| 3.7 Hypotesa 7 - Legg eina ætlan - | s.17 |
| 4.7 Savna upplýsingar | s.17 |
| 5. Hetta eru vit komin fram til | s.19 |
| 6. Sig øðrum frá | s.19 |
| 7. Fylgiskjal | |
| 7.2 Fylgiskjal | s.20 |
| 7.3 Fylgiskjal | s.23 |
| 7.4 Fylgiskjal | s.24 |
| 7.5 Fylgiskjal | s.26 |
| 7.7 Fylgiskjal | s.27 |

# 1. Hetta undrast vit á

Hvør brúkar meira elektristet í 7. flokki í Eysturskúlanum, gentur ella dreingir?

# 2. Hví er tað so?

Fyri at meta um, hvør brúkar meira streym í skúlanum, gentur ella dreingir í 7. flokki í Eystursúkanum, so hava vit gjørt nakrar hypotesur, ið vit fara at kanna nærri, um tær passa ella ikki.

Okkara hypotesur eru hesar:

1. Dreingir brúka meira streym enn gentur. Tí at teir vita ikki, at mann kann sløkkja orkubrúkandi funktiónir á telefonini, og tí hava teir hesar funktiónir tendraðar

2. Dreingir brúka meira streym á telefonini, tí at teir spæla meira spøl á telefonini. Gentur brúka meira sosialar appir. Vit vænta at appirnar, sum dreingirnir brúka (spøl), brúka meira streym.

3. Dreingir brúka meiri ljósstyrki enn gentur, og harvið eisini meira streym enn gentur, tí teir t.d spæla spøl á telefonini, og so hava teir hægri ljósstyrki, fyri at síggja.

4. Gentur brúka meira elektrisitet enn dreingir, tí at gentur hava nógv fleiri elektrist tól við í skúla heimanífrá og tær løða eisini telefonina hjá sær meira í skúlanum enn dreingirnir.

5. Genturnar brúka meira streym enn dreingirnir, tí at genturnar løða telefonirnar, brúka ketilin og dansa just dance. Meðan dreingirnir ikki brúka eins nógv elektronisk tól.

6. Gentur brúka meira elorku, tí tær: turka hárið við hárturkara, slætta hárið, spæla onkuntíð teldu, hyggja í sjónvarpið, spæla playstation, løða telefon, brúka ketil, microovn, ipad, telefon …

7. Gentur brúka meira streym, tí at genturnar hava húsdjór, sum brúka meira streym og genturnar hava fleri húsdjór.

# 3. Legg eina ætlan

Tá ið vit nú hava nakrar hypotesur, mugu vit leggja eina ætlan um, hvussu vit kunnu kanna um hypotesurnar passa ella ikki. Vit hava lagt eina kanningarætlan til hvørja hypotesu. Ætlanirnar eru talmerktar sum hypotesurnar í punkt 2. T.v.s at ætlan 3.1 hoyrir til hypotesu 1, ætlan 3.2 hoyrir til hypotesu 2 o.s.fr.

# 4. Savna upplýsingar

Tá ætlanin er gjørd, kunnu vit savna okkara upplýsingar, sum skulu hjálpa okkum at prógva, um okkara hypotesur passa ella ikki. Savnaðu upplýsingarnar hjá okkum hava somu talmerking sum hypotesurnar. T.v.s., at upplýsingar 4.1 hoyra til hypotesu 1, upplýsingar 4.2 hoyra til hypotesu 2 o.s.fr.

# 5. Hetta eru vit komin fram til

Við hjálp av kanningunum og upplýsingunum, kunnu vit koma fram til eina niðurstøðu um okkara hypotesur. Vit taka samanum úrslitini og meta um, um okkara hypotesurnar passa ella ikki. Hvør hypotesa hevur sína egnu niðurstøðu, men vit hava eisini eina niðurstøðu, sum er ætlað okkara høvuðsundran: “Hvør brúkar meira elektristet í 7. flokki í Eysturskúlanum, gentur ella dreingir?”

Niðurstøðurnar til hvørja hypotesu hava somu talmerking sum hypotesan, t.v.s. niðurstøða 5.1 hoyrir til hypotesu 1, niðurstøða 5.2 hoyrir til hypotesu 2 o.s.fr.

## 3.1. Ætlan til at kanna hypotesu Nr. 1

Hypotesa 1

*Dreingir brúka meira streym enn gentur. Tí at teir vita ikki, at mann kann sløkkja orkubrúkandi funktiónir á telefonini, og tí hava teir hava hesar funktiónir tendraðar*

Fyri at kanna hesa hypotesu vilja vit gera hetta:

- Gera spurningar um funktiónir sum brúka streym á telefonini.
- Spyrja og hyggja hvat genturnar og dreingirnir hava tendrað á telefonini
- Gera stabbamynd við svarunum frá flokkinum

## 4.1. Savna upplýsingar til hypotesu Nr. 1

Vit leitaðu á netinum eftir, hvørjar fukntiónir brúka nógv battarí, skrivaðu tað niður og gingu runt og spurdu hvat øll høvdu tendrað á telefonini av ymiskum funktiónum. Síðan hava vit sett úrslitini í eina stabbamynd, so mann sær úrslitið greiðari.

Skrásetingin og stabbamyndin síggjast niðanfyri:

| | Gentur | Dreingir |
|---|---|---|
| 3G | 10 | 7 |
| Lokalitetstjen. | 14 | 15 |
| Opt. a.bag. | 11 | 12 |
| Litfulla mynd | 6 | 3 |
| Bluetooth | 1 | 2 |
| | | |
| Meddelser | 14 | 13 |
| Wifi | 10 | 10 |
| | | |
| Fara úr allatíð | 13 | 14 |
| Facebook | 6 | 6 |
| Flymode | 10 | 4 |
| tlf slø. u ov køld | 14 | 9 |




## 5.1. Hetta eru vit komin fram til í Hypotesu 1

Vit eru komin fram til, at tað er næstan akkurát líka, hvussu nógv gentur og dreingir brúka tær ymisku funktiónirnar.
Tríggja staðni høvdu genturnar hægri tøl og fýra staðni høvdu dreingirnir hægri tøl, men tilsamans var munurin størri hjá gentunum, so hypotesan passaði ikki.
Tað kann vera, at gentur brúka minni streym kortini, tí tá ið vit spurdu genturnar og dreingirnar, brúktu genturnar nógv meira flyfunktion. Tað sparir nógv battarí.
Hetta er ikki ein heilt neyv kanning, tí at tað kann vera, at vit hava skrivað okkurt skeivt niður, ella at vit hava gloymt at hyggja eftir, um okkurt er tendrað hjá onkrum.

## 3.2. Ætlan til at kanna hypotesu Nr. 2

Hypotesa 2:
*Dreingir brúka meira streym á telefonini, tí at teir spæla meira spøl á telefonini. Gentur brúka meira sosialar appir. Vit vænta at appirnar, sum dreingirnir brúka (spøl), brúka meira streym.*

Fyri at kanna hypotesu 2, vilja vit gera hesa kanningarnar

- Gera og geva spurnarbløð út. (fylgiskjal 7.2)
- Telja upp spurnarbløðini. (fylgiskjal 7.2) og skriva niður í google sheeds.
- Kanna hvørja app - hvussu nógv % av battarínum brúkar appin uppá 2 min.
- Gera stabbamynd.

## 4.2. Savna upplýsingar til hypotesu Nr. 2

Vit spurdu 15 dreingir og 15 gentur í 7. flokki í Eysturskúlanum í einum fríkorteri í okkara kanning.

Talvan niðanfyri vísir, hvussu nógvar gentur og dreingir brúka appina, hvussu nógv % av battarínum appin brúkar uppá tveir minuttir og longst til høgru, hvussu nógv % av battarínum tey brúka uppá appina. (Spurnarbløðini eru í fylgiskjali 7.2)

| | Dreingir | Gentur | % uppá 2 min |
|---|---|---|---|
| Instagram | 4 | 12 | 1 |
| Snapchat | 12 | 13 | 1 |
| Youtube | 8 | 3 | 2 |
| fb/messenger | 3 | 6 | 1 |
| ókeypis tónleik | 2 | 5 | 1 |
| spotify | 1 | 1 | 1 |
| musical.ly | 1 | 1 | 1 |
| dog whistle | 2 | 0 | 1 |
| rider | 11 | 4 | 1 |
| snake vs block | 1 | 0 | 1 |
| bow masters | 2 | 0 | 1 |
| clash of clans | 3 | 0 | |
| clash royal | 2 | 0 | |

| | Dreingir | Gentur |
|---|---|---|
| Instagram | 4% | 12% |
| Snapchat | 12% | 13% |
| Youtube | 16% | 6% |
| fb/messenger | 3% | 6% |
| ókeypis tónleik | 2% | 5% |
| Spotify | 1% | 1% |
| musical.ly | 1% | 1% |
| dog whistle | 2% | 0% |
| Rider | 11% | 4% |
| snake vs block | 1% | 0% |
| bow masters | 2% | 0% |
| clash of clans | 3% | |
| clash royal | | |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| flappy dunk | 2 | 0 | 2 | | flappy dunk | 4% | 0% |
| poker | 1 | 0 | 1 | | Poker | 1% | 0% |
| | | | | | | | |
| smash hit | 1 | 0 | 1 | | smash hit | 1% | 0% |
| geometry | 1 | 0 | 1 | | Geometry | 1% | 0% |
| | | | | | | | |
| swipe brick | 0 | 1 | 0 | | swipe brick | 0% | 0% |
| dancing line | 0 | 1 | 1 | | dancing line | 0% | 1% |
| space frotier | 0 | 1 | 1 | | space frotier | 0% | 1% |
| crossy rood | 0 | 1 | 1 | | crossy rood | 0% | 1% |
| 1010 | 0 | 1 | 1 | | 1010 | 0% | 1% |
| paper.io | 0 | 3 | 2 | | paper.io | 0% | 6% |
| | | | | | | | |
| | | | | | úrslit: | 130% | 112% |
| | | | | | í miðal: | 8,7% | 7% |

Tølini í talvuni niðast til høgru eru hvussu nógv prosent appirnar hjá dreingjum og gentum brúka í miðal á telefonini.

Dreingirnir brúka í miðal: 130% : 15 dreingir = 8,7 % í miðal og

Genturnar brúka í miðal: 112% : 15 gentur = 7% í miðal




Á myndini omanfyri síggja tit munin á elnýtsluni hjá appum í telefonini hjá gentum og dreingjum í 7. flokki í Eysturskúlanum.

## 5.2. Hetta eru vit komin fram til í hypotesu 2

Í miðal brúka dreingirnir 8,7% og genturnar 7% (meira kunning fæst í fylgiskjali 7.2).
So okkara hypotesa vísti rætta svarið.

Vit eri komnar fram til, at appirnar, sum dreingirnir brúka í einum fríkorteri, brúka meira streym enn appirnar genturnar brúka.
Hetta er serliga tí, at nógvir dreingir spæla við appina "Rider" og tann appin brúkar meira streym enn appirnar sum genturnar brúka.

## 3.3. Ætlan til at kanna hypotesu Nr. 3

Hypotesa 3

*Dreingir brúka meiri ljósstyrki enn gentur, tí teir t.d spæla spøl á telefonini, og so hava teir hægri ljósstyrki, fyri at síggja.*

Fyri at kanna um tað passar, vilja vit gera hesar kanningar:

- Spyrja hvønn næming um hvat ljósstyrkin er, hyggja eftir hvat hon er og skráseta í eitt ark.
- Síðan kunnu vit finna miðaltalið fyri ljóðsstyrkina hjá gentum og dreingjum og samanbera.

## 4.3. Savna upplýsingar til hypotesu Nr. 3

Vit hava eygleitt, spurt og hugt runt í flokkinum og sæð hvat ljósstyrkin er sett til á telefonunum. Skrásetingin sæst niðanfyri:

| Gentur | Dreingir |
|---:|---:|
| 2 | 10 |
| 0 | 5 |
| 0 | 5 |
| 2 | 3 |
| 3 | 10 |
| 2 | 0 |
| 4 | 4 |
| 0 | 0 |
| 3 | 10 |
| 9 | 10 |
| 7 | 4 |
| 4 | 10 |
| 9 | 5 |
| 0 | 7 |
| 0 | 0 |
| 0 | 3 |

Við hesum upplýsingum, kunnu vit nú finna miðaltalið fyri ljósstyrkina á telefonunum hjá gentum og dreingjum. Vit leggja tølini hjá gentunum saman og býta við 16, tí tað eru 16 gentur í flokkinum. Tað sama gera vit við tølini hjá dreingjunum.

Samlað tal gentur: 45

Miðaltal gentur: 45 : 16 = 2,81

Samlað tal dreingir: 86

Miðaltal dreingir: 86 : 16 = 5,37

## 5.3. Hetta eru vit komin fram til í hypotesu 3

Okkara hypotesa var, at dreingir brúka meiri ljósstyrki enn gentur, og harvið eisini meira streym enn gentur, tí teir t.d spæla spøl á telefonini, og so hava teir hægri ljósstyrki, fyri at síggja.

Tað sær eisini út sum á kanningini, at dreingirnir brúka meira ljósstyrki enn genturnar.

Miðaltalið hjá dreingjum var 5,37 og miðaltalið hjá gentum er 2.81.

Við hesi kanning, kunnu vit eisini siga, at dreingir nýta meira elektristet enn gentur, tí hægri ljósstyrki á telefonini nýtir meira battarí.

Hypotesan hjá okkum kann sigast at vera sonn.

## 3.4. Ætlan til at kanna hypotesu Nr. 4

Hypotesa 4:

*Gentur brúka meira elektrisitet enn dreingir, tí at gentur hava nógv fleiri elektrisk tól við í skúla heimanífrá og tær løða eisini telefonina hjá sær meira enn dreingirnir í skúlanum.*

Fyri at fáa svar uppá um okkara hypotesa passar ella eitt sindur vilja vit gera hesar kanningarnar:

- Spyrjað næmingar hvørji elektrisk tól tey hava við í skúla, fyri at vita um gentur ella dreingir hava flest tól við
- Gera spurnablað, har vit spyrja, hvussu leingi mann løðir telefonina og hvussu leingi mann brúkar telefonina í skúlanum. Tí at longur tey brúka tólini meira streym brúka tey
- Kanna hvussu nógv Watt tólini brúka. Tí at eitt tól, sum brúkar nógv watt, brúkar nógvan streym upp á stutta tíð.

## 4.4. Savna upplýsingar til hypotesu Nr. 4

Hvussu leingi løða genturnar og dreingirnir telefonina í skúlanum:

- Dreingir løða telefonina umleið 66 minuttit um dagin í skúlanum tilsamans.
- Gentir løða telefonina umleið 440 min um dagin í skúlanum tilsamans.

Hvussu leingi brúka genturnar og dreingirnir telefonina um dagin í skulanum:

- Dreingirnir brúka telefonina umleið 220 minuttir um dagin tilsamans í skúlanum.
- Genturnar brúka telefonina umleið 260 minuttir um dagin tilsamans í skúlanum.

hvussu nógv watt brúka tólini um sekundi??

Ketil =2000w

løðari =34,5w

hátalari =10w

telefon =6-10w

oyramikrofon = tráðleysar oyramikrofonir brúka 1-1,8 W og vit hava ikki funnið útav hvussu nógvar tær vanlig u brúka men vit halda 0W.

## 5.4. Hetta eru vit komin fram til í hypotesu 4

Nú hava vit spurt, hvørji elektrisk tól gentur og dreingir hava haft við í skúla heimanífrá fýra ferðir.
Tað vísur seg at genturnar hava haft fleiri elektrist tól við í skúla enn dreingirnir.
Tað vísur seg eisini, at genturnar løða og brúka telefonina í skúlanum longri enn drongirnir.
Tí halda vit, at vit kunnu siga at okkara hypotesa var røtt. Og at genturnar brúka nógv meira elektrisitet enn drongirnir í skúlanum.

## 3.5. Ætlan til at kanna hypotesu Nr. 5

Hypotesa 5

*Genturnar brúka meira streym enn dreinginir, tí at genturnar løða telefoninar, brúka ketilin og dansa "Just dance". Meðan dreingirnir ikki brúka sera nógv elektronisk tól.*

Fyri at kanna hetta, fara vit at gera hesar kanningarnar

- Eygleiða flokkin og spyrja onkran hvat tey brúka el-orkuna til. Vit skriva niður so hvørt, tá onkur genta ella drongur brúkar el-orku.
- Skriva úrslitini í eina talvu og gera rimamynd av úrslitunum

## 4.5. Savna upplýsingar til hypotesu Nr. 5

Vit hava eygleitt flokkin og spurt onkran, hvat tey brúka el-orkuna, og har hava vit skriva niður so hvørt, tá onkur genta ella drongur brúkar el-orku. Vit hava skriva sett tað í eina talvu. Vit hava spurt 16 dreingir og 16 gentur í kanningini.

Talvan niðanfyri vísir, hvussu nógvar gentur og hvussu nógvir dreingir brúka ketil, køliskáp, teldu og løða telefonina.






## 5.5. Hetta eru vit komin fram til í hypotesu 5

Genturnar brúka øll el-tólini meira enn dreingirnir og tí halda vit at okkara hypotesa er sonn. Genturnar brúka meira streym í skúlanum enn dreingirnir.

## 3.6. Ætlan til at kanna hypotesu Nr. 6

Hypotesa 6

*Gentur brúka meira elorku, tí tær: turka hárið við hárturkara, slætta hárið, spæla onkuntíð teldu, hyggja í sjónvarpið, spæla playstation, løða telefon, brúka ketil, microovn, ipad, telefon …*

Fyri at kanna, um okkara hypotesa passar, fara vit at gera hesar kanningarnar í okkara flokki

- Gera spurnablað, har vit spyrja, hvørji elektrisk tey brúka.
- Googla hvussu nógva el-orku tólini brúka.

## 4.6. Savna upplýsingar til hypotesu Nr. 6

Fyri at fáa svarað spurninginum, hava vit deilt eitt spurnarblað út til allan flokkin. Í spurnarblaðnum spyrja vit hvørji tól tey brúka heima.

Vit hava tíverri mist spurnarblaðið og úrslitini burtur í tilgongdini, so vit kunnu ikki vísa á tølini og upplýsingarnar vit grunda okkara niðurstøðu á.

## 5.6. Hetta eru vit komin fram til í hypotesu 6

Okkara kanningar hava staðfest, at okkara hypotesa er røtt. Hypotesan hjá okkum var at gentur brúka meira el orku. Tað vísti seg at gentur brúka meira, tí at gentur brúka fleiri tól og tey tólini brúka meira el-orku t.d. fønari og slættijarn.

Gentur brúka 27,77% meira enn dreingir

## 3.7. Ætlan til at kanna hypotesu Nr. 7

Hypotesa 7:
*Gentur brúka meira streym, tí at genturnar hava húsdjór, sum brúka meira streym og genturnar hava fleri húsdjór.*

Vit fara at gera hesar kanningar í flokkinum, fyri at vita um okkara hypotesa passar ella ikki:

- Gera spurnarblað, har vit spyrja, hvørji húsdjór næmingarnir hava og hvørja streymkeldu djórið/ini nýta.

## 4.7. Savna upplýsingar til hypotesu Nr. 7

Okkara spurnarblað er at síggja í fylgiskjølunum, (sí fylgiskjal 7).

Vit settu svarini í google-sheets og gjørdu rimamyndir, sum síggjast niðanfyri:

Her sæst úrslitið um hvat fyri húsdjór næmngarnir hava:




Og her sæst úrslitið um næmingarnir meta, at teir brúka meira streym við at hava húsdjór:




## 5.7. Hetta eru vit komin fram til í hypotesu 7

Sum vit síggja, so er tað serliga genturnar, sum meta seg brúka meir streym, við at hava húsdjór. Vit spurdu eisini hvørjar streymkeldur djórini hjá teimum brúktu.

Har vóru 3 gentur við kettu, sum skriva, at kettan brúkar vatn og ein sigur, at ljósið tendrar av sær sjálvum, tá kettan fer út = brúka tey meiri streym.

Harafturat vóru 3 gentur og 1 drongur við fleiri húsdjórum (s.s. hundi, hønum, fiskum, dunnum osfr), sum skrivaðu at tey m.a. brúktu akvarium, hitalampa, heitt vatn, kalt vatn, ljós, pumpu, fønara.

Tískil er tað nokk ikki munur á hvussu nógvan streym gentur og dreingir brúka um tey hava húsdjór, men heldur hvat slag av húsdjórið tey hava. Her síggja vit, at gentur í ein lítlan mun hava djór, sum brúka meira streym, s.s. hestar og hundar.

Eisini síggja vit, at tað eru fleiri gentur enn dreingir, sum hava húsdjór.

Hetta mekir sostatt, at okkara hypotesa passar. Genturnar í 7. flokki í Eysturskúlanum hava húsdjór, sum brúka meira streym og genturnar hava fleri húsdjór enn dreingirnir. Tí brúka genturnar meira elektrisitet til húsdjór enn dreingirnir í 7. flokki í Eysturskúlanum.

# 5. Hetta eru vit komin fram til

Vit hava kannað og roynt at svarað hypotesunum, sum vit settu og sum hava samband við okkara høvuðsundran:: *"Hvør brúkar meira elektristet í 7. flokki í Eysturskúlanum, genturnar ella dreingirnir?"*

Onkrar hypotesur vístu seg at halda og aðrar passaðu ikki heilt.

Okkara kanningar vísa, at svarið um hesa undran, er tengt at hvørjum elektriskum keldum vit kanna innan. T.d. so eru vit komin fram til, at gentur nýta meira streym tá talan er um at hava elektrisk tól við heimanífrá og tá talan er um at løða telefonina í skúlanum, ímeðan dreingir nýta meira streym, tá talan er um, hvørja ljósstyrki telefonin er sett á.

Fýra hypotesur vóru, at genturnar brúka meira streym enn dreingirnir og passaðu hesar allar. Tríggjar hypotesur vóru, at dreingirnir brúka meira streym enn genturnar og passaðu tvær av hesum. Tann eina vísti, at gentur og dreinigir brúka á leið eins nógvan streym.

Samanumtikið vístu fýra kanningar, at genturnar brúka meira streym og tvær kanningar vístu, at dreingirnir brúka meira streym.

Niðurstøðan frá okkara kanningum er tí, at genturnar í 7. flokki í Eysturskúlanum brúka meira elektrisitet enn dreingirnir.

# 6. Sig øðrum frá

Arbeiði at fáa granskingarúrslitini liðug dróg út, so vit hava enn ikki greitt øðrum frá okkara granskingarúrslitum. Men vit hava lagt eina ætlan um, hvussu vit kunnu greiða fleiri frá okkara arbeiði og úrslitum:

- Hvør bólkur fer at greiða frá í flokkinum, hvat úrslitið av arbeiðinum hjá tí bólki var.
- Hvør næmingur fær síni granskingarúrslit við heim, so at hann kann greiða frá har heima fyri foreldrum, systkjum, familju og vinum frá síni gransking
- Skúlin hevur ein kunningarskíggja, har fara okkara kanningarúrslit at "rulla", so at allir næmingarnir á skúlanum kunnu síggja tey.
- Vit fara at greiða 5. flokki í Eysturskúlanum frá okkara gransking og úrslitum, tí at tey hava eisini verið við í kappingini og tí hava royndir sum gera, at tey skilja betur granskingararbeiði og granskingarúrslit.
- Fleiri av bólkunum hava gjørt eina PowerPoint framløgu klára, til betur at siga øðrum frá sínum kanningum. Vit viðfesta framløguna um kanningina av "Hypotesu 5" sum eitt dømi um, hvussu vit vilja siga øðrum frá.

# 7. FYLGISKJØL

## 7.2. FYLGISKJAL

### Spurnarblað

set x við 3 av appunum sum tú brúkar mest í fríkorterinum (ikki spøl) :

- ☐ instagram
- ☒ snapchat
- ☐ youtube
- ☐ facebook/messenger
- ☐ ókeypis tónleika appir
- ☐ Spotify
- ☐ netflix/viaplay
- ☐ nethandil-app
- ☐ ask.fm
- ☐ musical.ly
- ☐ boomerang
- ☐ Twitter
- ☒ dog whistle

hvørji spøl brúkar tú á tlf. í fríkorterinum ?(max.3)

Rider

- ☐ Genta
- ☒ Drongur

Takk fyri (;

Uppteljing dreingir

| | |
|---|---|
| nstagram | 4 |
| Snapchat | 12 |
| Youtube | 8 |
| acebook/ Messenger | 3 |
| Ókeypis tónleikar appir | 2 |
| Spotify | 1 |
| etflix/Viaplay | |
| ethandlar | |
| sk.fm | |
| usical.ly | 1 |
| oomerang | |
| witter | |
| dog whistle | 2 |
| ider | 11 |
| nake vs block | 1 |
| ow masters | 2 |
| lash of clans | 3 |
| lash royal | 2 |
| lappy dunk | 2 |
| eed Farm | 2 |
| oker | 1 |
| ifa | 1 |
| mash hit | 1 |
| tack | |
| geometry | 1 |
| ood pussle | |
| wipe brick | |
| ay Day | |
| aper.io | |
| 1010 | |

| | |
|---|---|
| ~~Dancing line~~ ~~Race fronbier~~ ~~Rossy road~~ | |
| Dancinsline | |
| Race fronber | |
| Rossy road | |
| 1010 | |
| Paper. io | |

Uppteljing gentur

| | |
|---|---|
| nstagram | ~~\|\|\|\|~~ ~~\|\|\|\|~~ \|\|\| |
| Snapchat | \| ~~\|\|\|\|~~ ~~\|\|\|\|~~ \|\| |
| Youtube | \|\|\| |
| acebook/ Messenger | ~~\|\|\|\|~~ \| |
| Ókeypis tónleika appir | ~~\|\|\|\|~~ |
| Spotify | \| |
| Vetflix/Viaplay | |
| etchandlar | |
| sk.fm | |
| Musical.ly | \| |
| Boomerang | |
| Twitter | |
| Dog whistle | |
| Rider | \|\|\|\| |
| nake vs block | |
| ow masters | |
| lash of clans | |
| Clash royal | |
| lappy dunk | |
| Veed Farm | |
| Poker | |
| Fifa | |
| mash hit | |
| Stack | |
| geometry | |
| Nood pussle | \| |
| wipe brick | \| |
| Hay Day | |
| ~~Paper.io~~ | |
| 1010 | |

| | |
|---|---|
| Dancing line | \| |
| Pace Frontier | \| |
| Rossy Road | \| |
| 1010 | \| |
| Paper.io | \| |

## 7.3. Fylgiskjal

Uppteljing av hvar ljósstyrkin er sett til á telefoninum.

| G | D |
|---|---|
| 2 | 10 |
| 0 | 5 |
| 0 | 5 |
| 2 | 2 |
| 3 | 10 |
| 2 | 0 |
| 4 | 4 |
| 0 | 0 |
| 3 | 10 |
| 9 | 10 |
| 7 | 4 |
| 4 | 10 |
| 9 | 5 |
| 0 | 7 |
| 0 | 0 |
| 0 | 3 |
| | 3 |

## 7.4. FYLGISKJAL

Spurnarblað

Hvussu leingi ladar tú telifonina um dagin í skúlanum.

Svara her=___10___

Hvussu leingi brúkar tú telefonina um dagin í skúlanum.
Set X ☐

0-5 min =___X___
5-10 min=_______
10-15 min=_______
15-20 min=________
20-30 min=_________
Ella meira enn 30=______

Set X

Drongur ☒ Genta ☐

Elektrisk tól við í skúla, Gentur og Dreingir

Uppteljing

Dreingirnir = 14 telefonir, 2 ladarir og 1 oyramikrofon.
Gentur = 16 telefonir, 6 ladarir, 8 oyramikro, 1 ketil, 1 hátalara-ladara, 1 powerbank og 1 hátalara.
(07.09 2017)

Drongir = 15 telefonir, 3 ladarir
Gentir = 16 telefonir, 4 ladarir, 1 powerbang, 4 oyramikro
(12.09 2017)

Drongir = 14 tlf og 1 ladara (tað vóru allir dreingir í skúla)
Gentir = 13 tlf, 6 ladarar, 5 oyramikrofonir og 1 powerbank
(allar genturnar vóru ikki í skúla 13 gentur vóru í skula)
(13.09 2017)

Dreingir = 13 tlf, 2 ladarir, 1 oyramikrofonir (ein drongur mangla)
Gentir = 13 tlf, 4 ladarar, 6 oyramikro, powerbank (3 gentur mangla)
(14.09 2017)

# 7.5. Fylgiskjal






## 7.7. FYLGISKJAL

# Spurnablað

Hevur tú nakað djór?

- ☒ Ja
- ☐ Nei

Um ja, hvat? Skriva niður hvat/hvørji djór tú hevur.

ketta, fuglar, hamstara

Metir tú, at tit brúka meiri streym, við at hava húsdjór?

- ☐ Ja
- ☒ Nei
- ☐ Veit ikki

Um ja, hvørja streymkeldu brúkar djóri/djórini hjá tær? t.d. kann ein fiskur brúka ljós og pumpu.

Nope

Ert tú ein genta ella ein drongur?

- ☒ Genta
- ☐ Drongur

***Rebekka, Hervør og Maibrit <3***